# Nistelrooy fingið frí



Hollendski Real Madrid-áleyparin, Ruud van Nistelrooy, hevur fingið frí frá felag sínum til Champions League dystin í kvøld ímóti Dynamo Kiev í Madrid. Orsøkin er, at kona van Nistelrooy er við bar, og er sett at eiga hvørja løtu. Í staðin fyri van Nistelrroy er brasilski landsliðsleikarin, Ronaldo úttikin. Ronaldo hevur ikki spælt undir nýggi venjaran, eftir at hann bleiv opereraður í knænum í summar, men nú sær út til, at Ronaldo fer at fáa fyrsta dystin í hesum kappingarárinum.

# FCK ætlar sær stig

Í kvøld byrjar annað umfar av Champions League, og donsku meistararnir FCK spæla á útivølli ímóti skotsku meistarunum úr Celtic. FCK-venjarin, Ståle Solbakken, heldur tað ikki vera ómøguligt at fáa stig í Skotlandi. FCK hevur svenska áleyparan Marcus Allback kláran aftur, og hetta er stórur styrkur. Venjarin heldur tað vera ein stóran fyrimun, at FCK kann fara aftur á vøllin og lata Celtic skapa dystin, tí at styrkin hjá FCK er júst í verjupartinum. Dysturin byrjar kl. 19.45 í kvøld.

# KÍF fingið

**Leygardagin og sunnudagin varð høllin í Kollafirði karmur um nógvan hondbólt. Danska felagið AaB var og vitjaði, og í hesum sambandi var Sosialurin í høllini, har vit spurdu fólk, hvat tey hildu um nýggju høllina hjá kollfirðingum.**

HONDBÓLTUR

*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*
*Myndir: Tróndur Olsen*



Nú er hon endiliga komin, mundu flest allir kollfirðingar hugsa, tá høllin fyri fyrstu ferð hýsti eini kapping í vikuskiftinum. Ár eftir ár hava fólk í Kollafirði og fólk kring felagið tosað um, hvussu gott tað hevði verið við eini høll, men oftast hava hetta bert verið tankar og ikki ítøkiligar ætlanir. Tankarnir um høllina hava tó stundum verið uppi og vent í nevndararbeiðnum í Kollafirði, men oftast er hetta prát fánað burtur, og fólk hava sligið seg til tols við at skula koyra til aðra bygd at venja og spæla heimadystir.

## Heimavøll langt frá heimbygdini

KÍF hevur tríggjar ítróttagreinar undir sínum felag. Hondbólt, flogbólt og kappróður. Kappróðurin er ikki nakar trupulleiki, tí í Kollafirði er ein góður fjørður, og umstøðurnar til kappróður eru fínar. Sjálvt um kapproðrarneystið kundi verið í betri standi, so halda kollfirðingar, at umstøðurnar sum heild hava verið í lagi, serliga við tí í huga, at ein ítróttarhøll hevur verið í gerð síðstu árini.

Verri hevur verið við hondbóltinum og flogbóltinum. Hondbólturin er gamal í garði í Kollafirði, og hevur henda ítróttargrein verið íðkað í meir enn eina hálva øld. Enn hava kollfirðingar ikki havt heimavøll í heimbygdini, og tí hava teir muga spælt heimadystir í aðrari bygd.

Tað byrjaði við, at kollfirðingar leiktu sínar heimadystir í høllini á Hálsi. Hetta er langt afturi í tíðini, og flest øll ung minnast hetta ikki. Eftir hetta gekk leiðin inn á Skála, har kollfirðingar leiktu í nógv ár. Carlo Poulsen, fyrrverandi hallarvørður í høllini á Skála, tók altíð væl ímóti kollfirðingum, og sjálvt um langt var at koyra mongu vetrarkvøldini, so var altíð hugaligt at koma inn á Skála.

## Frá Skála til Vestmanna

Frá Skála gekk leiðin til Vestmanna, har Finnbogi Joensen ráddi í høllini. Vestmenningar, við Finnboga á odda, tóku eisini altíð væl ímóti kollfirðingum, og hetta kom sjálvsagt væl við, tí tað var ikki altíð stuttligt at koyra eftir vestmannavegnum í heglingsæli og hørðum vindi. Vestmannavegurin steðgaði mongum manni eitt vetrarkvøld, men oftast stríddu kollfirðingarnir seg til Vestmanna, tí venja mátti man.

Endiliga kom so høllin í Hoyvík. Sjálvt um KÍF

**Kári Durhuus, lærari í Kollafirði og fyrrverandi venjari hjá KÍF:**



*Hvussu dámar tær nýggju høllina?*
Mær dámar sera væl nýggju høllina. Hon er deiliga ljós, og hetta haldi eg hava stóran týdning fyri eina ítróttarhøll.
*Hvønn týdning metir tú høllina hava fyri Kollafjørð?*
Tað er ilt hjá mær at siga, men eg minnist hvussu stóran týdning høllin í Vestmanna hevði fyri okkum vestmenningar. Um tað verður sum har, so fer hon at hava stóran týdning fyri trivnaðin, og tey ungu børnini, sum fara at renna í høllini dagliga, fara at fáa fyrimyndir í eldru spælarunum bæði í hondbólti og flogbólti.

**Hervør Hansen, trúgvur áskoðari:**



*Hvussu dámar tær nýggju høllina?*
Mær dámar høllina heilt væl. Tað er gott at fáa eina høll her í Kollafirði.
*Hvønn týdning metir tú høllina hava fyri Kollafjørð?*
Hetta hevur stóran týdning fyri bæði hondbólt og flogbólt, tí nú verður møguleiki at venja her í bygdini. Hetta verður eisini gott fyri trivnaðin, tí nú fáa kollfirðingar eitt stað, har tey kunnu koma saman.

**Jónleif Sólsker, venjari hjá Kyndli:**



*Hvussu dámar tær nýggju høllina?*
Hetta er ein góð høll, og hon er deiliga ljós. Gólvið sær tó í dag út til at vera nakað hált, tí spælararnir glíða nakað illa á tí.
*Hvønn týdning metir tú høllina hava fyri Kollafjørð?*
Nú dugi eg illa at meta um týdningin fyri bygdina, men KÍF hevur altíð fingið góð úrslit. Tá hugsað verður um, at yngru liðini bert hava vant í fimleikahøll fyrr, so vænti eg, at fleiri av yngru liðunum kunnu fáa heilt góð úrslit, nú høllin er komin. Hetta kemur so at síggjast aftur á besta liðnum um nøkur ár.

**Kristianna Dam, limur í flogbóltsnevndini:**



*Hvussu dámar tær nýggju høllina?*
Høllin er sera snotilig, ljós og rúmlig. Hon hevur góð sitipláss. Harafturat eru umklæðingarúmini og brúsuviðurskiftini av teimum bestu. Uttanfyri høllina er eisini vert at leggja til merkis, at vit hava góð parkeringsviðurskifti. Til síðst haldi eg eisini, at høllin liggur væl fyri mitt í bygdini.
*Hvønn týdning metir tú høllina hava fyri Kollafjørð?*
Umstøðurnar at venja gerast nógv betri hjá bæði venjarum og leikarum, og eg vænti tí, at bæði flogbólturin og hondbólturin í bygdini í bygdini fara at mennast nógv í framtíðini. Í mun til fyrr, so fara áskoðararnir nú eisini at fáa møguleikan at koma at hyggja eftir dystum í bygdini. Harafturat fer felagið at fáa møguleikan at skipa fyri kappingum í hondbólti og flogbólti. Til síðst vænti eg eisini, at høllin gerst eitt stað, har bæði eldri og yngri fara at møtast. So hetta verður týdningarmikið fyri trivnaðin í bygdini.